# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tað er ikki ein spurningur, um ísurin við pólarnar bráðanr, men hvussu skjótt hann bráðnar*
*(amerikanskur veðurlagsgranskari)*



Tað vendist ikki aftur:

## Ísurin á pólunum fer at bráðna

**Møguleikin fyri at sleppa undan, at ísurin við pólarnar bráðnar burtur, er um 50 prosent, sigur ST í einari frágreiðing, sum verður kunngjørd í vár**

Veðurlagsserfrøðingarnir hjá ST ivast ikki í, at tað er luftdálkingin, sum hevur gjørt, at ísurin við Norðpólin, Suðurpólin og í Grønlandi bráðnar, og teir halda, at møguleikin fyri at steðga hesari gongdini er um 50 prosent.

Tað kunnu ganga fleiri hundrað ár, til allur ísurin við pólarnar og í Grønlandi er bráðnaður burtur, men eydnast tað ikki at steðga tí stóra útlátinum av veðurlagsgassum, fer ísurin at bráðna skjótt.

ST-serfrøðingarnir siga, at bráðna ísurin burtur, fara heimshøvini at fløða millum fýra og seks metrar, og tað fer at hava við sær, at nógv láglendi fer undir. Eitt nú fer oyggjalandið Maldivurnar undir, og í stórbýum sum New York, London og Tokyo fer sjógvurin at fløða niðan í gøturnar.

ST-veðurlagsserfrøðingarnir almannakunngjørdu sína seinastu frágreiðing í síðsta mánað, og har var niðurstøðan, at tað er at kalla vist, at tað er dálkingin, sum er orsøk til tann veksandi hitan á Jørðini.

Um tveir mánaðir kemur ein frágreiðing afturat. Jonathan Overpeck, veðurlagsgranskari á lærda háskúlanum í amerikanska statinum Arizona, er millum teirra, sum hava skrivað hana. Hann sigur við bretska blaðið The Guardian, at tað er ikki ein spurningur, um ísurin við pólarnar fer at bráðna, men hvussu skjótt hann bráðnar. Ein av útrokningunum hjá serfrøðingunum sigur, at heimshøvini fara at fløða ein metur í hesari øldini, sigur hann.

## USA hevur fullfíggjaða ætlan um álop á Iran

**Amerikanararnir ætla at bumba kjarnorkuverk og samferðslukervið í Iran, gevst landið ikki við sínum kjarnorkuætlanum**

Amerikanski flogberin "Dwight D. Eisenhower" liggur nú í Persiska Flógvanum, um nakrar dagar kemur ein flogberi afturat inn í flógvan, og tann triði sigst vera á veg. Tað hevur fingið fleiri at halda, at USA fyrireikar seg til at bumba mál í Iran, um landið ikki gevst at ríka uran, soleiðis sum ST hevur kravt.

BBC veit at siga, at amerikanska herleiðslan hevur lagt eina fullfíggjaða ætlan um álopið. Eftir henni skulu flogførini bumba kjarnorkuverk, flogvallir, herflotastøðir, rakettstøðir og aðrar herstøðir kring alt Iran, samstundis sum herskip skulu skjóta rakettir eftir nøkrum av málunum.

Amerikanska verjumálaráðið avsannaði fyrradagin, at USA ætlar at leypa á mál í Iran, men sambært BBC liggur álopsætlanin klár í ovastu leiðsluni, sum heldur til í Florida.

Kjarnorkueftirlitið hjá ST hevur sagt, at iranar hava ríkað so mikið av urani, at tað er nóg mikið til ídnaðarligt brúk, men at tað kortini fer at taka fleiri mánaðir, áðrenn landið kann gera eina kjarnorkubumbu. Iranska stýrið avsannar harafturímóti, at landið ætlar at fáa sær kjarnorkuvápn.

Samstundis bendir alt á, at Iran ætlar ikki at lata seg ræða av av amerikonsku hóttanunum. Í gjár fór iranski herurin undir eina stóra venjing, og iranska sjónvarpið vísti myndir av verjurakettum, sum eru ætlaðar til at skjóta flogfør hjá fíggindanum niður.

### STUTT SAGT

#### Bíða eftir bjarging

Trý fólk, sum vóru farnir niðan á hægsta fjallið í amerikanska statinum Oregon, Mount Hood, bíða nú eftir hjálp at sleppa omanaftur. Tey trý, tveir menn og ein kvinna, sleppa ikki omanaftur, tí veðrið er so ringt, og tað vánaliga veðrið hevur eisini forðað bjargingarliðunum at veita teimum hjálp, skrivar AP. Tey trý hava fartelefonir við sær, so tey fáa givið boð frá sær, og harafturat hevur eitt teirra útgerð, sum ger, at bjargingarliðini vita, hvar á fjallinum tey trý eru stødd. Jim Strovink, løgregluovasti, sigur við AP, at tey trý eru vát og køld. Tey hava ein hund av slagnum Labrador hjá sær.

#### Fangar latnir leysir

Umleið 8.000 fólk, sum hava sitið í fongsli í afrikanska landinum Rwanda, eru latin leys, hóast tey vóru skuldsett fyri at hava verið uppi í fólkamorðinum har í 1994. Fyrr eru umleið 60.000 fólk, sum vóru skuldsett fyri tað sama, latin leys, og stjórnin vónar, at hetta kann lekja sárini eftir tað blóðuga fólkanmorðið, sum kostaði umleið 800.000 mannalív. Tey, sum mistu síni næstu í fólkamorðinum, mótmæla avgerðini hjá stjórnini. Tey siga seg stúra fyri, at drápsmenn kunnu fara at endurtaka tað, sum teir gjørdu fryri 13 árum síðani. Myndugleikarnir hava gjørt vart við, at fleiri av teimum leyslatnu verða tikin aftur, tí tey seini hava hava roynt at fjala, at tey vóru uppi í fólkamorðinum.

#### Betri kunning

Í seinastuni er komið fram, at ólag hevur verið á teimum svensku kjarnorkuverkunum fleiri ferðir tey seinastu árini. Tað hevur fingið danska umhvørvismálaráðharran, Connie Hedegaard, at krevja, at danskir myndugleikar verða kunnaðir, tá ólag er á verkunum. Í gjár samdust hon og svenski starvsbróðurin hennara, Andreas Carlgren, um eina skipan, sum skal tryggja, at myndugleikarnir í Danmark verða kunnaðir, tá ólag er á svensku kjarnorkuverkunum.